# Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**



Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo



Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

Næstu ferð:

## Lestrarblaðið 2011

HESAFERÐ:

## Skála

*Í hesum blaðnum seta vit fokus á samfelagið á Skála*

Í blaðnum er hetta at lesa:

**SÍÐA 2:**
Flest skálafólk í dag

**SÍÐA 4-5:**
Ungir dreingir smíða sín egna bát

**SÍÐA 7-10:**
Eilif var í knúsi

**SÍÐA 12-13:**
Regin trívist í grótinum

**SÍÐA 15:**
Egnarar møta tíðliga til arbeiðis

**SÍÐA 16:**
Helena hevur kundar úr øllum landinum



*Mynd: Vágaportalurin*

# Stendur á havsins botni

Enn einaferð er sluppin Høganes sokkin.

Fyri góðum trimum árum síðani sakk hon við bryggju í Runavík, men kom tá upp aftur. Men fyri góðum tveimum vikum síðani hendi tað sama aftur, hesaferð við bryggju á Skála.

Dýpdin er soleiðis her við havnalagið, at Høganes í roynd og veru stendur á havsins botni.

*snorri@sosialurin.fo*

# Tað mesta í 25 ár

Fólkatalið á Skála hevur ligið omanfyri 600 tey seinastu sjey árini. Í roynd og veru er fólkatalið uppá tað mesta síðani 1985.

Hagtølini frá Hagstovuni vísa greitt, at í seinnu helvt av 80 unum var talið eisini omanfyri 600, men síðani 1994 hevur tað ligið undir.

Ikki fyrrenn í 2004 fór tað aftur upp um 600, og í november mánaði í fjør var tað tað hægsta nakrantíð, 657 - tað sama sum í 2007.

Hetta er ein rættiliga stórur vøkstur, tí síðani 1996 er fólkatalið økt við 104 fólkum.

*snorri@sosialurin.fo*

## Møtirøð alla vikuna

Hvørt einasta ár skipa tey í Meinigheitshúsinum fyri eini sonevndari missiónsviku.

Hetta er ein møtirøð við evangeliskum innihaldi, har talarar og sangkreftir ymsastaðni frá plaga at luttaka.

Á Skála byrjaði henda missiónsvikan í gjárkvøldið og varir fram til sunnudagin.

*snorri@sosialurin.fo*

## Norðast til sunnast við Oyggjablaðnum




Síðani á vári í fjør hevur Sosialurin havt Oyggjablaðið sum eitt eykablað í hvørjum mikudagsblaði.

Her hava vit vitjað kring oyggjarnar, eins og vit hava tikið upp ávís viðkomandi evni, so sum veiðu, føroyska framleiðslu, bilar, fiskivinnu og bøkur.

Í Oyggjablaðnum eru vit nú í gongd við eina nýggja rundferð kring oyggjarnar, sum í stóran mun fylgir 7. breiddarstigi á heimsatlasinum.

Vit hava valt at kalla rundferðina »Føroyar – norðast til sunnast«. Ætlanin er so líðandi, men tó ikki slaviskt – at vitja flestu bygdir og oyggjar, ið liggja nærhendis hesum ása hetta komandi árið.

Góðan lesihug.

*snorri@sosialurin.fo*